Gjestal Vestlandsgarn - Superwash Sport

Barnajakkar (Kot)

Størrelser 2 4 6 8 10 ár

Overvidde:
Ilaggarts mál ca 70 76 82 88 94 cm
Hel lengde: ca 48 52 56 60 64 cm
Ermelengde: ca 26 30 33 36 39 cm
MATTRIALER: Gjestal Vestlandsgarn (100% ull) ella Superwash Sport (100% superwash ull), nøstur á 50 g.
Kan eisa strikkes í Bomull Sport (100% bomull).
Orkide (100 % polyester), nøstur á 50 g.

Vestlandsgarn/Superwash Sport
nál nr 2½ ella eina nr 2½
buntlengd ca 10 11 12 13 14 nøstur
O.B.S. Bergen í næsta ekstra der det ikke brukes Orkide (gutt)
- **ORKIDF** (til pike)
nál nr 1½ ca 1 1 1 2 2 nøstur

Pinnar: Rundp og strengsp nr 2½ og 3½ ella 4. Eina rundp nr 3 til skalper

13 knappar til pike og 7 knappar til gutt

Vanligar forkortelsar
M = maska, r = rætt, v = vrang, str = strikk, g = gangur, omg = umgang; vf-bord = vrangbord, glattstr = glattstrikk, rettstr = rettstrikk, vrangbordstr = vrangbordstrikk, kantm = kantmaska, arb = arbeidet, beg = begynna, fors = forsetta, sm = saman, g = gram

Strikkefasthet: 23 m glattstrikk í breiddina á pinnar nr 3½ ella 4 mátt 30 cm. **Husk at strikkefastheten má hoyrast hvís resultatet skal bli veltykkt.**

Dan ein ikki er oppgivin í mál, ætlast í hesum lagnum ein **Vestlandsgarn/Superwash Sport.**

Ryggen
Legg upp 75-81-87-93-99 m á pinnar nr 2½ og str 4 p fyrst og tilbaka í vrangbordstr, nært 2 r, 1 vf og 10 p í r. 5 ferðir. Skift til pinnar nr 3½ ella 4 og str 1 p glattstr frá vrangin hvørt dent økes jevnt fordelt til 81-87-93-99-105 m. 1 kantm í hvørt side sum str í alla p og tapnes ikki í monstrinni. Str mønstur eftir diagrammet til arb mátar ca 48-52-56-60-64 cm og fell av til ein pent, jevn kant sum ikki streymar.

Venstre forstykke
Legg upp 15-18-51-54-57 m á pinnar nr 2½ og str kant sum á ryggin. Skift til pinnar nr 3½ ella 4. Sett de yttarstu 14-14-16-16-18 m á eina hjálparband til stolpar. Str 1p glattstr frá vrangin hvørt dent økes, eventt fordelt til 34-36-39-42-45 m.

Mønstur rygg, ermar, hetta og lomm



= glattstr, á rettan, vr á vrangan
= vr á rettan, r á vrangan
- sett 3 m á hjálpep. fram. arb, str 3 m r, str m frá hjálpep. r.
- sett 3 m á hjálpep. bak arb, str 3 m r, str m frá hjálpep. r.

Str fletten stuk á venstre forstykke

1 kantm í hvørt side. Str mønstur eftir diagrammet til arb mátar ca 32-36-39-42-45 cm og fell á á hvørt 2. p 3 2 2 2 1 m mót halsin í hvørt fyri alla storleikar. Str til arb mátar sum ryggin og fell av tey nærstu 10 m á hvørt.

Høyre forstykke
Str sum venstre, men spegilvent.

Uppskriftin hesa vikuna

Ermene
Legg upp 47-49-51-53-55 m á pinnar nr 2½ og str kant sum á ryggin. Skift til pinnar nr 3½ ella 4 og str 4 p fyrst og tilbaka. **Men** fell 1 m í hvørt side á hvørjari 2. p 8 gangur (tíkt fyri alla storleikar). Skift til Vestlandsgarn/Superwash Sport og ok til 81-87-93-99 m jevnt fordelt. Str mønstur eftir diagrammet til arb mátar 16-17-18-19-20 cm. Fell av de miðterstu 9-9-9-9-9 m og str hvørt side leitt og tón sig.
Høyra side: Str 2 p r fram og tilbaka. Fell av á hvørt 2. p tvíst mót halsin 8,7,7,7,7 m - 8,7,7,7,7 m - 8,8,8,8,7 - 9,9,8,8,8 - 9,9,9,9,9 m. Sir den aðra sidan av hetta lik. Sy ella mask hetta sum undir lik. Sy de av feltu undir mót sidastykkini á tvers overst í ruppin á hetta. Sy hetta til halskanten frá undir undir á hvørt stolpe. Fest alla løsu trádar pent á vrangin.

Hette, gutt
Legg upp 97-97-103-109-115 m á pinnar nr 2½ og str kant sum undir á bolin. Skift til pinnar nr 3½ ella 4 og str mønstur eftir diagrammet, men fell 1 m í hvørt side á hvørjari 2. p 8 gangur í hvørt side (tíkt fyri alla storleikar) eftir kanten í rettstr. Str vidare sum til pike.

Prøvsla ikki arb., men legg páarg í hvat í teksti er ónakt ella ólogligt. Samtykkir og lá okkum at leggja til rætt er tað.

Bette, pike
Legg upp 85-81-87-93-99 m med Orkide á pinnar nr 3½ ella 4 og str r fram og tilbaka, **men** fell 1 m í hvørt side á hvørjari 2. p 8 gangur (tíkt fyri alla storleikar). Skift til Vestlandsgarn/Superwash Sport og ok til 81-81-87-93-99 m jevnt fordelt. Str mønstur eftir diagrammet til arb mátar 16-17-18-19-20 cm. Fell av de miðterstu 9-9-9-9-9 m og str hvørt side leitt og tón sig.
Høyra side: Str 2 p r fram og tilbaka. Fell av á hvørt 2. p tvíst mót halsin 8,7,7,7,7 m - 8,7,7,7,7 m - 8,8,8,8,7 - 9,9,8,8,8 - 9,9,9,9,9 m. Sir den aðra sidan av hetta lik. Sy ella mask hetta sum undir lik. Sy de av feltu undir mót sidastykkini á tvers overst í ruppin á hetta. Sy hetta til halskanten frá undir undir á hvørt stolpe. Fest alla løsu trádar pent á vrangin.

Lummer gutt.
Plukk upp 21-27-27-33-33 m cá 8 cm frá kanten nedan og 3 m frá sidasømmen á p nr 3½ ella 4 og str 20-11-12-14-15 cm mønstur eftir diagrammet. Str 10 p á fram og tilbaka og 4 p á vrangbordstr í tvíst 1 r, 1 v. Fell av á hvørjari av sømmunum til á fyrstykkini. Fest øll løsu trádar pent á vrangin og sy 1 knappur sy eventuelt undir knappahullini.

Lommer pike.
Plukk upp 21-27-27-33-33 m cá 8 cm frá kanten nedan og 3 m frá sidasømmen á p nr 3½ ella 4 og str 10-11-12-14-15 cm mønstur eftir diagrammet. Skift til Orkide og fell jevnt fordelt til 16-21-21-25-25 m. Str 8 cm í fram og tilbaka. Fell av til ein pent, jevn kant. Brett kanten á Orkide dobbelt mót vrangin og sy den til með løsu sting. Str den aðra sømmin lík. Sy hvørt side av sømmunum til á fyrstykkini. Fest øll løsu trádar pent á vrangin og sy 1 knappur sy eventuelt undir knappahullini.

Tógvheilsølan
TRÁÐUR SP/F
Tlf. 312727
Sverrisgøta 19 · Postboks 181 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 31 27 27 · Fax +298 31 96 23 · Mobile +298 21 77 27
Privat: Tel +298 31 66 46

ítróttur

Nr. 230 • mikudagur • 29. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Bochum tosar um Toda

Men føroyski landsliðsmaðurin í FCK hevur einki hoyrt um, at hann møguliga skal til Týsklands at spæla fótbólt

YRKISFÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Todi Jónsson hevur havt nógvan undanvind í heyst. Í gjár søgdu vit, at hann í onkrum av donsku bløðunum mánadagin fekk besta ummælið av øllum spælarunum, sum vóru í Parkini sunnudagin.

At tað hevur gingið væl hjá Toda, hava tey eftir øllum at døma eisini lagt til merkis aðra staðni enn í donsku fjølmiðlunum.

Í stóra týska ítróttarblaðnum Sport Bild stóð í síðstu viku at lesa, at bundesligu felagið VFL Bochum skuldi vera áhugað í at keypa Toda Jónsson. Venjarin hjá felagnum varð endurgivin fyri at hava sagt, at teimum tørvaði ein evnaríkan og skjótan álopsspælara, og at Todi Jónsson avgjørt hevði verið ein møguleiki til álopsplássið. Eftir at fimtan umfør eru avgreidd í bundesliguni, er Bochum á átjanda og aftasta plássinum.

– Eg havi einki hoyrt um hetta, fyrrenn tit siga tað. Tað hevði verið ein avbjóðing at spælt í álopinum hjá teimum. Men eg taki sovorðin tíðindi púra róliga. Eg trívist væl í FCK, har eg eri sáttmálabundin í tvey og eitt hálvt ár afturat. Tað ræður um at vísa støðug avrik hvørja ferð. Eg havi ongantíð kent, at avrikini hava verið so støðug, sum tey hava verið, síðani eg slapp av við skaðan, ið eg fekk, tá eg var í Føroyum og spældi landsdyst ímóti Slovenia. Um nakað felag verður áhugað, so mugu teir venda sær til FCK. So fáa vit at síggja, hvat felag talan verður um, hvat teir eru sinnaðir at betala, og hvat FCK og eg sjálvur kunnu fáa burturúr. Tað er ein langur vegur, men sjálvandi er tað spennandi, heldur Todi Jónsson

Spenningurin varðveittur

Í kvøld fer FCK at spæla venjingardyst í Parkini. Teir skulu spæla ímóti Rosenborg, sum fyrireikar seg til í komandi viku at spæla UEFA Cup dyst. Tá stríðið í kvøld er liðugt, skulu teir í FCK møta einar tvær ferðir afturat. So fáa teir vetrarfrí, og 3. januar fara teir undir fyrireikingarnar til seinna helming av kappingini um DM.

– Fyri okkum hevði tað alstóran týdning, at vit fingu øll stigini sunnudagin. Vit hava síðstu tíðina spælt fleiri kostnaðarmiklar javnleikir. Tíbetur hava hini úrslitini lagað tað soleiðis, at vit framvegis eru við í kappingini um DM. Hjá okkum kom tað væl við, at Jákup Mikkelsen og teir mánakvøldið tóku øll stigini frá Brøndby. Tað verður hugaligt at fara undir aftur kappingina, heldur Todi Jónsson, sum roknar við, at FCK – akkurát sum í fjør – í fyrireikingunum í vetur fer á venjingarlegu í Suðurafrika.

Ongland fylgir við

Todi Jónsson hevur ongantíð fjalt yvir, at hann hevur havt serligan áhuga fyri eingilskum fótbólti, og at Liverpool hevur verið felagið hjá honum. Higartil hevur einki felag í bestu eingilsku deildini givið til kennar, at teir hava verið áhugaðir í Toda. Men tað tykist, sum um eingilski fótbóltsheimurin fylgir væl við donskum fótbólti og ikki minst FCK.

Í vikuskiftinum ljóðaði, at Aston Villa er áhugað í David Nielsen. Myrki álopsmaðurin megnaði ikki at koma á liðið í FCK. Í nakrar vikur hevur hann roynt seg í Grimsby í næstbestu eingilsku deildini. Har hevur David Nielsen staðið seg so mikið væl, at Birmingham felagið sigst hava fingið eyga á hann. Ein annar álopsspælari, sum Aston Villa heldur eyguni við, er Ebbe Sand, danski landsliðsmaðurin í Schalke 04 í bundesliguni.

Í fyrradagin ljóðaði, at eitt annað av stórfeløgunum í Onglandi hevði verið í FCK og keypt inn. Talan er um Arsenal. London felagið hevur skrivað sáttmála við 17 árar gamla verjuspælaran Sebastian Svärd.

– Hann hevur spælt á talentliðnum hjá okkum, sum hoyrir heima í KB. Eg kenni ikki so nógv til hansara. Hann hevur onkra hendinga ferðina vant við superligu hópinum. Hann sigst vera sera evnaríkur, og tað er einki at ivast í, at Arsenal hevur sæð hann sum ein møguleika at gera íløgu í, sigur Todi Jónsson.

Avrikini hjá Toda Jónsson hava verið støðugt góð seinastu vikurnar, og hetta hava tey eisini lagt til merkis uttan fyri Danmark

Jón Rói og Jann Ingi til Derby

Í dag fara aftur tveir undir evnaríkir fótbóltsleikarar út um landoddarnar at royna seg

YRKISFÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Jón Rói Jacobsen hevur tvær ferðir givið avboð venga skaða, men nú sleppur hann so eisini at royna seg

Jákup í Stórustovu upplýsir, at talan er um Jón Róa Jacobsen úr HB og Jann Inga Petersen úr B68, sum hetta fram til 10. desember fara at royna seg í enska Premier League felagnum, Derby.

Væl dámdur venjari

Derby er í løtuni at finna á næst niðasta sessinum í deildini, so kanska ljóðar hetta ikki so lokkandi, sum eitt nú Liverpool, har Jón Rói áður hevur verið upp á tal.

Tað eru tó mong fótbóltskøn, sum hava álit á, at venjarin hjá Derby, Jim Smith, fær vent skútuni, soleiðis at Derby eisini komandi ár verður at síggja í bestu deildini.

Jim Smith er nevnliga sera avhildin í enska fótbóltsheiminum fyri avriki síni sum venjari. Umframt at hava fingið nógv burtur úr fremsta liðnum hjá Derby, er Smith eisini kendur fyri at duga væl at arbeiða langsiktað, kanska er tað hetta, hann hevur ætlanir um við báðum føroyingunum. Í øllum førum eru teir bodnir at koma til venjingar, sigur Jákup í Stórustovu, uttan at hann to vil rópa hetta fyri beinleiðis royndarvenjing.

Umframt teir báðar, sum fara avstað mikudagin, fer eisini Ingi Højsted úr B36 til Arsenal í komandi viku. Líkt er tí til, at áhugin fyri føroysku leikarunum er alsamt vaksandi.

Nógvir hava nú roynt seg

Nú er annars gott ár liðið, síðani Jákup í Stórustovu í samstarvið við fleiri stuðlar gjørdi eina miðvísa ætlan, um hvussu nakrir útvaldir føroyskir unglingar skuldu fáa høvi at royna seg uttanlands, og hetta má sigast at hava gingið væl. Jón Rói er nevnliga tann seinasti av hesum, sum fær møguleikan, og fyri fleiri er tað galdandi, at boð hava verið eftir teimum, eftir at teir hava roynt seg fyrstu ferð. Eitt nú hjá Jann Inga Petersen og Inga Højsted, sum fyri stuttum royndu seg hjá PSV Eindhoven.

Verkætlanin hjá Jákupi í Stórustovu varð stuðlað av Føroya Sparikassa, Tryggingarfelagnum Føroyar, Atlantsflog og Føroya Shell.